# ítróttur

Nr. 224 • fríggjadagur • 24. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin-VÍF 21-25 (10-10)

# VÍF gredddi skyldu sína

Liðskiparin hjá VÍF, Ingi Olsen, tykist als ikki steðga í løtuni, og aftur mikukvøldið var hann høvuðsmaður aftan fyri VÍF-sigurin

Mynd: Álvur Haraldsen

**Neistin mátti enn eina ferð lúta fyri oddaliðnum úr Vestmanna, men talan gjørdist ongantíð um somu eyðmýking sum í fyrra dystinum teirra millum. VÍF avrikaði ikki meira enn neyðugt var fyri at tryggja sigurin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki løgið, um tað vóru onkur neistafólk, sum stúrdu eitt sindur undan heimadystinum móti oddaliðnum úr Vestmanna. Higartil hetta kappingarárið hevur VÍF sýnt eina nærum ræðandi styrki, og millum annað høvdu teir fyrr í ár hølvað Neistan av.

Sum um hetta ikki var nóg mikið, tykjast vestmenningarnir at vera styrktir enn meira, nú Áki Olsen og Johnny Joensen aftur eru tøkir, meðan Neistin hinvegin mátti vera Jacob Jónsson fyri uttan mikukvøldið. Hann hevði fingið ein snudd í eygað undir venjing, og fekk tískil ikki spælt.

## Lág leikferð

Tað tóktist tó hampuliga skjótt greitt, at talan hesa ferð ikki fór at gerast um nakra eyðmýking. Vestmenningar settur als ikki somu ferð á spælið, sum teir onkuntíð hava gjørt, og serliga í byrjanini av dystinum tóktust teir illa skipaðir í verjupartinum, meðan álopsparturin ikki hekk saman.

Hóast Neistin nýttu vánaligu VÍF-byrjanina til at koma á odda 5-1, so mundu áskoðararnir tó alla tíðina hava varhugan av, at hetta ikki fór at halda. Spakuliga kom eisini betri skil á spælið hjá VÍF. Teir tettu holini í verjuni, og í álopspartinum sýndu serliga Ini og Sámal, hví teir at kalla altíð teljast millum nøvnini á føroyska máltindinum.

## Áki funnið formin

Kanska tóktist tað ov lætt hjá vestmenningum at venda dystargongdini, men í øllum førum dalaðu teir aftur nakað, eftir at teir høvdu lagt seg fram um neistaliðið. Liðini bæði fylgdust til hálvleikssteðgin, og seinastu løtuna av fyrra hálvleiki var Neistin væl meira ágangandi enn gestirnir.

Serliga mundi tað kennast hugaligt hjá áskoðarunum at síggja, at Áki Mørk loksins er um at finna stórspælið frá í vár fram aftur. Tá taldist hann millum týdningarmestu leikararnar á FM-liðnum, men higartil í heyst hevur avrikið ligið fleiri flokkar lægri.

Mikukvøldið sýndi hann tó í fleiri førum, at hann als ikki hevur gloymt, hvussu hondbóltur skal leikast, og hóast hann í tveimum týdningarmiklu støðum brendi upplagdan møguleika, so munnu viðhaldsfólkini fegnast um avrik hansara.

## Minimalisma

Hjá vestmenningunum var tað enn eina ferð Ingi Olsen, sum var heilt stóri profilurin. Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki var tað hann, sum royndi at seta ferðina á spælinum upp, og eftir at teir tíðliga fingu lagt sjógv niður til Neistan, kom sigurin ongantíð av álvara í vanda.

Neistaleikarin, Ragnar Zachariasen, sum annars er vestmenningur, tykist at vera ein sera spennandi leikari. Ikki minst orsakað av knallharða skotinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Neistin togaði seg soleiðis nærhendis favorittunum, men hvørja ferð munurin gjørdist heldur tunnur, varð ferð sett á spælið, so munurin varð endurskaptur.

Fyri lesaran tykist tað kanska, sum skrivingin kundi bent á, at VÍF rættiliga tók sær av løttum. Tað gjørdu teir tó ikki, men avrikið kom ongantíð upp á tað støði, sum teir sýndu í eitt nú oddadystinum um vikuskiftið. Spælararnir gjørdu júst tað, sum var neyðugt fyri at tryggja stigini, og hetta eydnaðist teimum eisini.

## Úr dalinum

Hjá neistanum mundi tað hóast enn eitt tap vera fleiri glottar at hóma í avrikinum hesa ferð, enn tað hevur verið seinastu vikurnar. Talan var hesa ferð um eitt nógv betri liðavrik, enn tað hevur verið, og leikararnir stríddust meira fyri øðrum, enn teir hava gjørt higartil í ár.

At liðavrikið var betri, gjørdi eisini, at persónligu avrikini í flestu førum gjørdust betri. Umframt Áka Mørk sýndi eisini Kári Mortensen gott spæl á bakkinum, men Ragnar Zachariasen tykist vera ein sera spennandi leikari. Ikki minst takkað verið skjótleikanum og dundurskotinum.

Enn noyðist hann tó at bíða í tolni eftir degnum, tá hann kann taka tvey stig frá beiggjanum, John. Til tess er styrkismunurin millum verandi og eftir øllum at døma komandi meistararnar alt ov stórur.

**Dysturin í tølum**
*Málskjúttar:*
*Neistin:* Kári Mortensen 7, Áki Mørk 5, Ræni Slættanes 3, Ári Rouch 2, Regnar Zachariasen 2, Helgi Justinussen 2(1)
*VÍF:* Ingi Olsen 9(2), Sámal Joensen 7, John Zachariasen 3, Áki Olsen 2, Johnny Joensen 2, Martin Hummeland 1, Harald Bjørgvin 1

*Brotskøst:*
Neistin 3, VÍF 3

*Útvísingar:*
Neistin 4, VÍF 3

*Dómarar úr H71:*
Petur S. Dahl og Kristian Martin Skála. Hóast talan sjálvandi eisini var um onkur mistøk, so var tað hugaligt at síggja, at togan og haldan at kalla hvørja ferð varð revsað við tveimum fingrum.



KÍF-Tjaldur 19-23

# Kollfir›ingar kroystir

**Vi› sigrinum á KÍF hevur Tjaldri nú lagt seg ájavnt H71 og Neistanum á stigatalvuni. KÍF er í fyrstu atløgu isolera › í botninum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Framgongdin hjá hondbóltsli›num úr Runavíkini tykist at standa vi›. Sí›ani n‡ggju leikararnir komu til landi›, hevur li›i› vunni› tveir av heimadystum sínum, og mikukvøldi› kom so fyrsti útisigurin til høldar.

Hetta hendi, tá Tjaldur vitja›i í Vestmanna, har kollfir›ingar framvegis spæla sínar heimadystir.

## Koppa›i í seinna

KÍF var annars oman á so at siga allan fyrra hálvleikin, og teir vóru eisini á odda vi› tveimum málum, tá fari› var› inn í skiftirúmini eftir 30 minuttir.

Tí›liga í seinna hálvleiki koppa›i alt tó fullkomuliga á høvdi›, og tá eitt korter var fari›, vóru gestirnir brádliga á odda 18-14.

KÍF fekk minka› naka› um munin aftur, men nærri enn tveimum málum kom teir ongantí›, og seinastu løtuna kundu runavíkingarnir sláa sigurin fastan.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
KÍF: Sune Davidsen 3, Vagnur Johannesen 3, Regin Petersen 3, Petur Martin Poulsen 3, Petur Martin Johansen 2, Kristian Madsen 2, Tomic Durica 2(1), Frí›rik Joensen 1
Tjaldur: Mortan Hansen 6, Zoran Sarcevic 5(1), Jens Martin Knudsen 4(1), Svein í Hei›unum 2, Sverri Justinussen 2, Arnfinn Langgaard 2, Ken Berendsen 1
Brotskøst: KÍF 1, Tjaldur 4
Útvísingar: KÍF 6, Tjaldur 5
Dómarar úr Kyndil: Hanus Kúrberg og



*Kollfirðingar eru framvegis niðast í fyrstu deild. Trý stig aftan fyri H71, Neistan og Tjaldur*

# F‡ra li› í oddinum

**Li›kappingin 2000/2001 byrja›i sunnudagin. Í fyrstu deild vór›u tveir dystir leiktir og bá›ir enda›i javnir, me›an tann tri›i dysturin millum KT og KTF bleiv útsettur.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Føroyameistararnir úr Havnar Telvingarfelag hava í ár mist tríggir stu›ulstelvarar, Flóvin Tór Næs, Martin Poulsen og undirrita›a. Hetta hevur vi›ført at a›rir hava fingi› kjansin at vísa sínar dygdir, og millum hesar er unglingurin Olaf Berg. Suni Merkistein telva›i ikki nógv á fyrsta li›i í fjør, men ár hevur hann fingi› leiklut á ø›rum bor›i, og ein annar gamal kenningur, Andrias Ziska, er vi› aftur eftir eina fimm ára langa talvhvíld.

Klaksvíkingar hava mist Ólavur Simonsen til Runavíkar Talvfelag, men tó kunnu klaksvíkingar metast sum favorittar.

Vestmenningar eru aftur at síggja í fremstu rø› eftir tveimum sabbatárum í a›ru deild. Teir hava í ár styrkt seg vi› navnframa kollfir›inginum Torbirni Thomsen.

## Torkil Nielsen vann á Herlufi

Sum sagt vór›u tveir dystir leiktir sunnudagin, tann eini var í Havn millum Havnar Telvingarfelag og Sandavágs Talvfelag. Dysturin enda›i heldur óvænta› 2-2.

Torkil leikti væl á fyrsta bor›i ímóti Herlufi Hansen. Hann fekk lítlan fyrimun vi› hvíta fólkinum og vann trygt.

Suni Merkistein og Bernhard Augustinussen samdust um javnleik tá lei› út ímóti endatalvinum. Har var› eingin avger› í kikaranum.

Á tri›ja bor›i tóku Olaf Berg og veteranurin Gutti Petersen javnleik beint á›renn talvi› bleiv spennandi. Eitt gott úrslit hjá Gutta, sum prógvar at hann enn heldur tørn ímóti ungu kanónunum.

Føroyameistarin frá 1983 Andrias Ziska, fann gamla stílin fram aftur ímóti Hera Christoffersen. Hann for›a›i snildisliga Hera at útvikla síni fólk, og vann hegnisliga.

Samanum eitt gott úrslit hjá sandavágsmonnum.

## Hvalvíkingar hepnir

Martin Brekká hev›i IM John Rødgaard yvir av sær á fyrsta bor›i í dystinum millum hvalvíkingar og vestmenningar. Martin telva›i væl og átti at hála javnleikin til húsar, men eftir eitt langt og javnt talv eydna›ist ta› hjá Rødgaardi at knekka Martin.

Torbjørn sum telva›i sítt fyrsta talv fyri vestmenningar, fekk finnu ímóti Finnbjørn Zachariassen og vann eitt heldur langt talv.

Øgiligt rok var› í talvinum á tri›ja bor›i ímillum Sámal Christiansen og John Jacobsen. John ogna›i sær kvalitet og átti at vinna, men tí›arney›in ávirka›i somiki› talvi› at Sámal fekk finnu inn og tá gavst John.

Á fjór›a bor›i vann Gunnar Joensen ímóti hondbóltsvenjaranum Kára Durhuus. Kári gjørdi ein øgilgan bukk sum misti mann.

Styrkin tey seinastu árini hjá hvalvíkingum hevur veri› tey fremstu bor›ini, men hesafer› bjarga›i tri›ja- og fjór›a bor›i teimum.

Klaksvíkingar og kollfir›ingar útsettu teirra dyst. Vert er at nevna, at Kollafjar›ar Talvfelag hevur ikki minni enn tveir stórmeistarar og ein altjó›a meistara á styrkilistanum, nevnliga Tiger, danin Hendrik Danielsen og Steffen Pedersen. Ikki eit á nøvn, men ikki er vist um KT fara at brúka teir.

## 2. deild og 3. deild

Runavíkar Talvfelag vi› Ólavi Simonsen á odda vunnu ein grei›an 3—1 sigur á gøtumonnum. Ólavur vann á John Joensen.

Bæ›i havnarli›ini í a›ru deild møttust, HT 2 vann somulei›is 3-1 á HT 3.

Toftamenn uttan Jens Kristian Hansen taptu óvænta› 3-1 ímóti KTF 2 í Klaksvík.

Í 3. deild hevur Vestmanna Talvfelag tvey li›. Tey møttust og ta› betra vann 4-0.

Li›i› hjá Franst Eliassen HT 4, vann ein ruddiligan 3-1 sigur á KTF 3, me›an KT 2 sum hev›i eitt sterkt li› vi› millum ø›rum Niclas Joensen á li›num, vann 3,5 - 0,5 á Róki.

Unglingar telva fyrsta umfar komandi vikuskifti.

## Gó› byrjan hjá Talvfelagnum Føroyar

Føroyska talvfelagi› í Keypmannahavn vann stórsigur í fyrsta umfari í 3. deild í donsku li›kappingini. Telva var› ímóti Farum sum er eitt javntsterkt li› á umlei› 2050 í mi›alrating, og úrsliti› bleiv heili 6-2 til føroyingarnar.

John Arni Nilssen og Heini Olsen vunnu skjótt og lættliga á ovastu bor›unum, me›an Bogi Ziska var› heppin at vinna sítt talv á tri›ja bor›i. Ey›un Nolsøe og Heini Danielsen leiktu javnt , me›an Terji Petersen tapti uppá tí› á sætta bor›i. Sjeynda og áttinda bor›i manna›u undirrita›i og Finnbjørn Vang, og hesir vunnu ruddiliga. Talvi› hjá Heina Olsen er vi› í bla›num í dag. Ikki serliga vælleikt hjá mótstø›umanninum, men kongagambit er altí› vert at hyggja nærri at.

Flóvin Tór Næs telvar eisini vi› felagnum í ár, men hann var í Íslandi í vikuskiftinum. Hann bleiv bi›in um at hjálpa einum talvfelag úr Reykjavík í íslendsku likappingini.

6-2 og máli› er uppflyting.

www.talv.dk sum er heimasí›an hjá Talvfelagnum Føroyar, fylgir millum anna› gongdini í donsku li›kappingini.

## Talvi› hesa vikuna

Kasper Wilken Damm - Heini Olsen
3.div Farum (1),
19.11.2000

1.e4 e5 2.f4 exf4 3.Rif3 g5 4.d4 Bg7 5.h4 h6 6.hxg5 hxg5 7.Rxh8 Bxh8 8.Rie5 d6 9.Fh5 Bxe5 10.dxe5 dxe5 11.Fh8 Kf8 12.Fxe5 Bg4 13.Ric3 Ric6 14.Fc5+ Fe7 15.Fxe7+ Rigxe7 16.g3 Rid4 17.gxf4 Rixc2+ 18.Kd2 Rixa1 19.fxg5 Rd8+ 20.Bd3 Ric6 21.Rid5 Rie5 0-1

**Stø›an 1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 9 | - | 0 | - | 0 | 303 | 218 | 85 | 18 |
| 2 | StÍF | 8 | 5 | - | 1 | - | 2 | 239 | 208 | 31 | 11 |
| 3 | Kyndil | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 199 | 173 | 26 | 8 |
| 4 | H71 | 8 | 3 | - | 0 | - | 5 | 214 | 228 | -14 | 6 |
| 5 | Neistin | 8 | 3 | - | 0 | - | 5 | 188 | 206 | -18 | 6 |
| 6 | Tjaldur | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 205 | 275 | -70 | 6 |
| 7 | KÍF | 9 | 1 | - | 1 | - | 7 | 198 | 238 | -40 | 3 |